
Býráð fyri borgaran

# Býráð fyri borgaran

**Kommunan veksur, men sosiali profilurin er viknaður seinastu árini. Starvsfólkini á dagstovnum og eldrasambýlum renna skjótari, og tað er at kalla ógjørligt at seta búgv. Tað mugu vit gera nakað við. Vit vilja byggja fleiri lestrar- og ungdómsíbúðir og fleiri eldrabústaðir. Næsta stigið er at fyrireika lutaíbúðir og fleiri útstykkingar. Vit skulu byggja meira, grønari og klókari, soleiðis at vit varðveita serstaka dámin í kommununi. Vit vilja styrkja sosiala profilin við fleiri plássum og hægri normeringum á eldra-, dagstovna-, frítíðarskúla- og ungdómsøkinum. Og vit vilja ganga fremst innan orku, ferðslu, ruskinnsavnan og endurnýtslu fyri eini grønari kommunu til okkum øll.**

### Býráðið skal vera fyri borgaran.

### Tað vilja vit. Hvat vilt tú?



# Kommunan fyri øll

## Bústaðir

Vit skulu hava nógv fleiri bústaðarmøguleikar í allari kommununi. Tað hevur ongantíð verið so átrokandi at byggja sosialt og alment sum nú. Vit vilja byggja ungdóms-, lestrar- og eldrabústaðir, so bæði ung og eldri trívast í kommununi. Vit vilja beinanvegin, saman við Bústøðum, fara undir at fyrireika lutaíbúðir. Ferð skal setast á útstykkingar og íbúðarbygging - eisini í bygdunum í kommununi. Í Javnaðarflokkinum vilja vit brúka allar heimildir til at fáa fjølbroyttari bústaðarmøguleikar. Heldur verandi atgerðaloysi á bústaðarøkinum fram, verða kommunan og høvuðsstaðurin bara fyri tey fáu. Vit vilja hava eina kommunu fyri øll. Har øll, uttan mun til aldur og fíggjarliga orku, trívast lið um lið.




JAVNAÐARFLOKKURIN





## Mentan og list

Ein livandi høvuðsstaður hevur eitt blómandi listaligt umhvørvi, sum vit øll kunnu njóta ágóðan av. Um ongar framførslur vóru við tónleiki, sjónleiki, myndlist og øðrum listaligum, vóru vit fátøk sum menniskju. Eitt ríkt listaligt umhvørvi er eingin sjálvfylgja, og vit skulu taka okkum væl av teimum borgarum, sum liva av at skapa, so at vit øll kunnu njóta úrslitið av teirra arbeiði. Nógv tann størsti parturin av teimum, ið hava listina sum livibreyð, búgva í okkara kommunu. Hesi skulu hava góðar umstøður at arbeiða. Vit vilja betra um hølisviðurskiftini fyri listafólk í kommununi, og vit vilja seta meira fíggjarliga orku av til okkara yrkislistafólk at virka fyri.

## Dagstovna- og eldraøkið

Tørvur er á nýskipan á eldraøkinum eins og á barna- og ungdómsøkinum. Starvsfólkini, sum eru um okkara yngstu og elstu borgarar, skulu hava tíð til nærveru. Tíð til at gera sær ómak við tí, sum tey duga best. Vit skulu hava fleiri námsfrøðilig starvsfólk inn á alt dagstovnaøkið. Og vit skulu hava fleiri røktarstarvsfólk inn á eldraøkið. Vunnin sáttmálarættindi skulu virðast. Børn og ung við serligum tørvi skulu hava umstøður og hølisviðurskifti til sernámsfrøðiligt virksemi. Og demensøkið skal raðfestast høgt. Atkomuviðurskiftini skulu vera í lagi, so førleikaskerd ikki eru fyri vanbýti. Tey flestu vilja vera heima sum longst og skulu hava allarbestu tænastu. Vit eru liðug at telja minuttir í heimarøktini. Okkara elstu hava uppiborið betri. Harafturat er tørvur á fleiri røktarheimsplássum. Tí vilja vit í komandi setu byggja nýtt ellisheim í Kollafirði, samstundis sum ferð verður sett á at útbyggja eldraøkið í kommununi sum heild.




JAVNAÐARFLOKKURIN






## Umhvørvi – nýggjar tíðir

Veðurlagsbroytingarnar eru veruligar, og veruligar broytingar skulu til. Sjálvsagt skal Tórshavnar kommuna ganga á odda, tá tað kemur til at verja umhvørvið. Vit skulu brúka minni, skilja betur og endurnýta meira. Vit skulu í øllum málum tora at hugsa nýtt og ikki vera bangin fyri at ganga nýggjar, grønar leiðir. Vit skulu hava fleiri løðistøðir til elbilar. Umhvørvisvinarligar verkætlanir, so sum smáar endurnýtslustøðir í býlingum, skulu raðfestast. Vit skulu hava meira vistfrøði og meira heimavelt inn í køkarnar á dagstovnum, í skúlum og á eldrasambýlum. Málið er, at allir almennir bygningar í kommununi skulu hitast við grønari orku. Ongin nýggjur bygningur skal hitast við olju. Tað er ein farin tíð.

## Trivnaður

Ein livandi høvuðsstaður dregur menniskju at sær. Skulu vit varðveita fólkavøksturin, eru góðir bústaðar- og arbeiðsmøguleikar ikki nokk. Gerandisdagurin skal fyllast við gevandi innihaldi. Við list, sum veitir íblástur, við spennandi og tíðarhóskandi mentanartilboðum og við góðum kørmum um ítróttar- og frítíðarlívið. Náttúruøki til dvøl og til spæl skulu gerast í allari kommununi. Og vit vilja hava eitt stórt og gott býarhús, har børn og vaksin kunnu vera virkin saman. Býarhúsið skal hava innandura spælipláss, kaffistovu, listaframsýningar, lestrarrúm, atgongd til heimsins miðlar og fult av bókum til vaksin og børn.




JAVNAÐARFLOKKURIN






## Vinnulív

Vit vilja støðugt virka fyri, at kommunan veitir góðar og fjølbroyttar karmar til vinnuligt virksemi. Tað skal vera pláss fyri stóru fyritøkunum, og handilslív og vinnuspírar skulu hava umstøður til at blóma. Tørvurin á nýggjum vinnuøkjum skal alla tíðina dagførast og eftirmetast, og kommunan skal skapa bestu umstøður fyri áhaldandi vinnulívsmenning í allari kommununi.

## Ferðsluviðurskifti

Ferðsluviðurskiftini í høvuðsstaðnum eru dagliga til ampa fyri okkum, sum búgva og virka her. Tað er stórur tørvur á betri parkeringsviðurskiftum. Vit eru liðug við at brúka drúgva tíð uppá at koyra runt og finna parkeringspláss. Vit skulu hava parkeringshús til langtíðarparkering í høvuðsstaðnum. Og harafturat skal tað vera smidligari at súkkla og brúka bussarnar. Tað lættir eisini um ferðsluna í býnum. Í Tórshavnar kommunu skulu vera góðar umstøður hjá fólki til gongu, á súkklu og í bili – eisini, tá bilurin skal parkerast.




JAVNAÐARFLOKKURIN



**Bergur Robert Dam Jensen,**
handilsmaður, Kollafjørður,
cajbdj@olivant.fo, 252180



**Bjarni Beder,**
stovnsleiðari, Tórshavn,
bjarni.beder@gmail.com,
214789



**Heðin Mortensen,**
býráðslimur, fyrrv. borgarstjóri,
Tórshavn,
hedinm1946@hotmail.com
hedin@torshavn.fo,
211196 – 311196



**Høgni Joensen,**
skúlastjóri, Tórshavn,
hogni.joensen@skulin.fo,
214109



**Birita Baldvinsdóttir Iversen,**
sjúkrarøktarfrøðingur,
Tórshavn,
birita-b@hotmail.com,
591229



**Bjørg Dam,**
sjálvstøðug vinnurekandi,
Tórshavn,
bjorgdam@gmail.com,
211428



**Helena Dam á Neystabø,**
býráðslimur, Tórshavn,
helenadn@torshavn.fo,
217721



**Høgni Midjord í Stovuni,**
sjálvstøðugur vinnurekandi,
Tórshavn,
hognissa@gmail.com,
268923

## Vit vilja hava kommununa aftur á javnaðarhendur



**Irma Justinussen,**
hárfríðkanarkvinna,
Tórshavn,
irmajus@gmail.com,
216291



**Kristianna Winther Poulsen,**
undirvísari á miðnámsskúla,
Hoyvík, kwp@globi.fo,
596062



**Niels á Reynatúgvu,**
tøknifrøðingur FT NET,
Signabøur,
posttilmig@hotmail.com,
243635



**Sára Gullfoss,**
heilsufrøðingur,
Hoyvík,
sara_thomsen@hotmail.com,
282015



**Tróndur Sigurðsson,**
býráðslimur,
Hoyvík,
trondurs@torshavn.fo,
218500



**Kári Johansen,**
arbeiðsformaður,
Tórshavn,
vorslan@olivant.fo,
226110



**Milia Egilsnes Anda,**
lesandi, Tórshavn,
milia.egilsnes.anda@gmail.com,
789940



**Odd Færø,**
fíggjarfrøðingur,
Tórshavn,
of@sev.fo
284284



**Súna Mørk,**
ergoterapeutur,
Tórshavn,
sunam@olivant.fo,
215589

# X við C

**10. novembur 2020**

C

JAVNAÐARFLOKKURIN